## FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Sjálvsstýri í ríkisfelagsskapinum

**Vilhelm Johannesen**
*Fólkatingsvalevni Javnaðarfloksins*



Javnaðarflokkurin er fyri, at vit framhaldandi eru í ríkisfelagsskapi við Danmark og Grønland, men flokkurin vil seta ein nýggjan karm um samstarvið í ríkisfelagsskapinum.

Her kunnu vit vísa á uppskotið um eina sjálvstýrislóg - eina lóg, ið greitt ásetir, at Føroyar hava sjálvstýri í ríkisfelagsskapinum. Eina lóg, ið javnsetir Føroyar og Danmark, sum tvær sjálvstøðugar tjóðir á jøvnum føti. Sjálvstýrislógin og samveldissáttmálin, ið skal vera ein samstarvssáttmáli millum Føroyar og Danmark, skulu hava altjóða viðurkenning. Hetta skal verða galdandi og bindandi.

Hóast vit vilja hava sjálvstýri í ríkisfelagsskapinum og vilja, at løgtingið skal hava evsta vald í øllum yvirtiknum málum, so verður tað framhaldandi neyðugt at hava neyvt samstarv við Danmark á fleiri økjum. Tí skulu vit hava ein samstarvssáttmála. T.d. skal samstarvið fevna um uttanríkistænastu, um sjúkraviðgerð á ríkissjúkrahúsinum og á øðrum donskum sjúkrahúsum, um atgongd hjá føroyingum til hægri skúlar og lærustovnar o.s.fr.

Sjálvstýrislógin er ein savnandi loysn, og javnaðarflokkurin er tann einasti, sum hevur eina nýtiliga loysn í spurninginum um ríkisrættarligu støðuna. Samgonguflokkarnir í borgarligu fullveldissamgonguni hava uppskot um, hvussu framtíðarstøða Føroya skal skipast, men teirra loysn hevur ikki undirtøku í fólkinum. Sambandsflokkurin hevur eitt nýskipanaruppskot, ið hevur til endamáls at nútímansgera heimastýrislógina, men hetta hevur heldur ikki undirtøku í fólkinum.

Ein breiður meiriluti av føroyingum tekur undir við, at heimastýrislógin verður avloyst, og at ein nýggjur karmur verður settur um samstarvið í ríkisfelagsskapinum. Og tað er tað, sum javnaðarflokkurin mælir til og vil samstarva um, fyri at finna eina loysn - fyri at røkka einum úrsliti. Hetta samstarvið eigur at fara fram bæði á løgtingi og á fólkatingi.

Vilja tit eina skjóta og skilagóða loysn á ríkisrættarligu støðuni - eina loysn, sum hevur undirtøku í fólkinum, so er tað javnaðarflokkurin, ið hevur hesa loysnina við sjálvstýrislógini og samveldissáttmálanum, sum skal áseta framtíðar samstarvið í ríkisfelagsskapinum millum Føroyar og Danmark.

Eg skal enda við at heita á tykkum um at fara mannsterk á val týsdagin 20. november og at seta krossin við javnaðarlistan ella eitt av valevnunum á lista javnaðarfloksins. Gera tit hetta, hava tit valt ein flokk, sum vil samstarva og finna loysnir, heldur enn at elva til klandur og stríð og samanbrestir, og tað er eitt gott val fyri Føroyar og føroyingar.

# H.Hoydal og Anfinn Kallsberg ofra vælferðina

**Marjus Dam**
*Fólkatingvalevni Sambandsfloksins*



Vit eru mong, ið eru stúrin um loysingina, ið Tjóðveldisflokkurin, Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin vilja fremja.

Høgni Hoydal hevur nevnt, at danir koma at spara heilar 20 milliardir, um Føroyar loysa eftir Fólkafloksleistinum. Hvat verður at gjalda í part hjá hvørjum føroyingi? Umframt núverandi alt ov høgu skattir?

20 milliardir at býta ímillum uml. 20.000 arbeiðandi føroyingar er ein millión í part.

So hvør arbeiðandi føroyingur skal gjalda eina millión afturat í meðal. Eg haldi, eins og mong onnur, at meira enn ríkiligt longu verður goldið ídag.

Eigur ein ikki at hugsa seg væl um, áðrenn nakar av loysingarflokkunum fær eina einastu atkvøðu? Vanligi føroyski skattgjaldarin megnar ikki eina slíka rokning umframt allar aðrar skyldur. Møguliga kunnu Annfinn Kallsberg, Jógvan Sundstein og Høgni Hoydal gjalda. Men teir syrgja fyri at sleppa undan sjálvir, ímeðan tygum fáa rokningina.

Vit vilja gera ríkisrættarligar broytingar - men tað skal vera livandi her eftir broytingina!

Tryggja Føroyar

Vel Sambandsflokkin

# Sambandsflokkurin vil umboða allar føroyingar á fólkatingi

**Finnleif Guttesen**
*Valevni fyri Sambandsflokkin*



Loysingarflokkarnir vilja bert umboða seg sjálvar og tí áttu allar ávaringarklokkurnar ringt hjá øllum føroyingum.

Sambandsflokkurin sigur púra klárt og greitt, at vit vilja varveita fólkatingsumboðini og tí stilla vit sjálvsagt eisini upp til hetta fólkatingsvalið har vit vilja umboða allar føroyingar, eisini teir sum búleikast uttanfyri Føroyar.

Loysingarflokkarnir við Tjóðveldisflokkinum á odda melda eisini greitt út, at teir vilja umboða ein ávísan part av føroya fólki um teir koma á fólkatingi, hetta er ein klár útmelding um, at loysingarflokkarnir seta føroya fólk í básar. Tey sum eru fyri loysingini vilja vit umboða á fólkatingi, meðan tey sum eru ímóti loysingini vilja vit ikki umboða.

Hendan greiða útmeldingin frá loysingarflokkunum, má fáa allar ávaringarklokkur at ringja hjá øllum føroyingum, tí hetta er eitt klárt tekin um, at tey sum ikki taka undir við loysingarflokkunum verða stilla út á síðulinjuna, meðan tey sum taka undir við loysingarflokkunum kunnu rokna við at koma inn í varman.

Øll sambandsfólk og samríkisfólk, ung sum gomul, siti ikki heima 20. november, men farið á val og setið krossin við eitt av umboðunum Sambandsfloksins, hetta merkir eisini eina atkvøðu fyri frælsið.

# Hvørjum skulu vit halda við?

**Zakarias Wang**
*eitt fólkatingsvalevni tjóðveldisflokksins*



Tað eru nøkur, sum stilla upp til fólkatingsval fyri at hjálpa ávísum donskum flokkum at koma til valdið, uttan at geva sær far um, hvønn føroyapolitikk hesir flokkar reka.

Tað er heilt ófatuligt, at nakar, sum vil móðurlandi okkara væl, kann fáa seg til at bera seg soleiðis at.

Sjálvandi hava vit øll okkara vinir millum danir, og kundu vit hugsað okkum at hjálpt teimum.

Tá ið eg fór at lesa við universitetið í Århus vóru vit 12 sum byrjaðu. Á jólum vóru vit bert 5. Ein av hesum varð landsformaður í socialdemokratiska landsfelagsskapinum hjá studentum, til hann kom at klandrast við ein annan, sum vildi sleppa sær fram í sama flokki. Hesin fekk tó ikki nóg mikið burtur úr har, og er nú limur í europatinginum fyri danska fólkaflokkin (Mogens Camre). Ein annar av mínum feløgum var vinstrimaður, og gjørdist fólkatingsmaður og europatingmaður fyri henda flokk. Ein annar gjørdist konservativur fólkatingsmaður. Ein annar av vinum mínum, sum byrjaði at lesa tvey ár seinni, kom skjótt í fólkatingið sum javnaðarmaður og situr nú sum ráðharri (Sven Auken).

Í 1971 var eg í Viborg fyri at fáa víðariútbúgving. Har var eg lærari hjá nøkrum fáum næmingunum. Nøkur ár eftir hoyrdi eg, at ein av hesum var vorðin ráðharri í stjórini hjá Schlüter. Einaferð hann var her í Føroyum spurdi hann eftir mær, og nú hoyri eg, at hann er formaður í vinstra, og sigst at hann verður forsætisráðharri ? treytað av at veljarakanningarnar halda, og tað er jú ikki víst.

Men skal eg fara at geva føroysku fólkatingveljarunum ráð um, hvønn part ið rætt er at fara upp í í donskum politikki, alt eftir tí mær dámar ávísar persónar?

Tað hevði jú verið fullkomuliga ábyrgdarleyst.

Tá eg las, kundu vinmenn mínir ongantíð skilja, at eg ikki vildi koma upp í nakran av teirra flokkum. Eg segði við teir, at eg skilti væl at danir høvdu ymsar flokkar, men í mun til okkum vóru teir allir eins, tí allir vildu teir hava ræðið á okkum, og tað dámdi okkum ikki. Tí kundu vit vera persónligir vinir uttan mun til hvønn flokk teir virkaðu í, men politiskt var eg sum føroyingum uttanveltaður í teirra stríði.

Hetta er rætta støðan hjá føroysku fólkatingsumboðunum í dag. Vit kunnu hava persónligt vinalag við danskar politikarar, men tá tað kemur til at avgera, hvør av hesum skulu fáa valdið, so er tað best undir okkara treytum, og fremsta treytin er, at vit sjálvi skulu fáa rætt til at taka avgerð um okkara lagnu.

Higartil havi eg so einki sæð til, at nakar av teimum donsku flokkunum vil ganga við til hetta, og so leingi ber ikki til at taka nakran av teimum fram um nakran annan. Nakað annað hevði verið samstarv við hitt føroyska og tey bæði grønlendsku fólkatingsumboðini, um so er, at tey eisini seta okkara áhugamál fram um tey hjá donskum flokkum.



## FÓLKATINGSVALIÐ 2001

# Broytingar eru onki at ræðast

**Jógvan Arge**
*valevni tjóðveldisfloksins til fólkatingið*



Allar dagar hevur tað víst seg at vera trupult at fremja broytingar. Tá broytingar verða framdar á arbeiðsplássum, er mótstøðan mangan hørð, tí starvsfólkini hava ilt við at venja seg til nýggju mannagongdirnar. Tey óttast tað ókenda og vilja varðveita tað, tey kenna.

Soleiðis er eisini, tá broytingar skulu fremjast í londum. Mótstøðan erstór, tí óttin fyri tí ókenda vinnur á viljanum til at taka við nýggjumavbjóðingum. Ein stórur partur av politiska stríðnum í Føroyum kemst avtílíkum ótta. Mótstøðan ímóti fullum sjálvstýri er grundfest í óvissu og politiskum óvilja.

Men Føroyar eru mitt í eini broytingartíð. Ikki bara á heimliga pallinum.

Tíðarandin seinnu árini hevur verið, at sjálvt fátøk hjálond taka róðrið íegnar hendur. Hetta hava tey gjørt við stórum hepni, tí viljin til at takaábyrgd var stórur. Tey gjørdust sjálvstøðug, tí tey ásannaðu, at tað var neyðugt.

Hesin viljin er eisini til staðar í Føroyum. Hann er sterkari enn nakrantíð. Heimastýrislógin er kolldømd, og broytingar verða framdar fyrr ella seinni. Men tær ganga seint, tí ein partur av politiska lívinum óttast avbjóðingar og pástendur, at broytingar eru av tí ónda.

Men tað er onki politiskt bragd at prædika svartskygni, at venda blinda eygað til tíðarandan og halda fast við tað verandi, tá tað verandi er ótíðarhóskandi. Lívsáskoðanin hjá andstøðuni hevur ofta negativt forteikn. Men framburður skapast bara við góðum treysti og bjartskygni. Hann skapast í viljanum til at liva.

Í roynd og veru snýr tað seg um at fara á fótur hvønn morgun og trúgva upp á framtíðina. Dómadagsspádómar elva ikki til annað enn ræðslu. Forsagnir um undirgang, tí eitt fólk vil taka við fullari búskaparligari ábyrgd, hava onki veruligt innihald. Tær eru ráðaleysir pástandir út í tóman heim. Svørt tala, ið brýtur niður.

Tjóðveldisflokkurin byggir ikki sína lívsáskoðan á svartskygni og døpur framtíðarútlit. Hann veit, at bakkøst kunnu koma. Men hann er til reiðar takkla tey í staðin fyri at ræðast tey. Hann gongur ikki á Christiansborg og rópar um hjálp. Hann hevur sjálvsvirðing og vil siga dønum, at føroyingar eiga at taka við ábyrgd.

Tí er umráðandi at velja rætt hesaferð. Tíðin krevur broytingar. Og tær eru onki at ræðast. Verður Tjóðveldisflokkurin ikki við í fremstu røð, tá hesar broytingar verða framdar, hevur tjóðin onga trygd fyri, at tær verða nóg góðar. Hann veit, hvat hann vil. Og hann talar greitt.

*X við E á valdegnum 20. november.*

# Sambandsflokkurin og Tjóðveldisflokkurin garantar fyri núverandi skipan

**Thomas Arabo**
*Fólkatingsvalevni Javnaðarfloksins*



Ein atkvøða til Sambandsflokkin ella Tjóðveldisflokkin er ein atkvøða fyri status quo í spurninginum um Føroya støðu í ríkisfelagsskapinum. Sambandsflokkurin vil varðveita tað verandi, um hann gerst nóg sterkur, og Tjóðveldisflokkurin klárar ikki at samla fólkið aftanfyri sínari víðgongdu og ópragmatiskari fullveldisætlan - ikki eingongd samgongan stendir aftanfyri hesa ætlan.

Tað vil vera sera mannminkandi fyri Føroyingar, um tað eydnast Tjóðveldisleiðsluni at úflyta klandur til Danmarkar. Tað er uppá tíðina, at Tjóðveldisleiðslan gerst meira semjusøkjandi og tekur undir við einari millumloysn. Valið til hettar fólkatingsvalið er ikki eitt val millum fullveldi og svartasta samband - henda uppfatanin tryggjar bert støðuna sum er, og týðningarmikið er, at tann millumvegur, ið klárar at samla ein breiðan meiriluta av Føroya fólki verður royndur. Seinastu 3 árini vísa, at annað skinn má takast um bak.

Javnaðarflokkurin hevur skotið upp eina loysn, ið liggur innanfyri ríkisfelagsskapin, men gevur okkum møguleikan at víðka um Føroyskt sjálvstýri við tí ferð, vit ynskja.

Javnaðarflokkurin hevur stak góðar royndir frá samstarvi við Tjóðveldisflokkin, og tað skal vera mín vón, at tær pragmatisku kreftirnar í Tjóðveldisflokkinum aftur fáa fótin fyri seg. Betongformalistarnir, ið nú ráða hesum flokki koma bert at tryggja status quo í viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark. Føroyar eru ein tjóð, men ikki ein nation í ST høpi. Tað kunnu vit blíva í morgin, um vit ynskja tað, men tað gera vit ikki. Hetta er ein veruleiki Høgni Hoydal og flokkur hansara mugu finna seg í, og ikki sær tað pent út, tá hesir royna at seta vognin fyri ryssuna heldur enn øvugt, og vilja hava danskarar at viðurkenna, at Føroyar er ein nation, fyri so at skula samráðast um at blíva nation.

Vil tú eina loysn á viðurskiftunum millum Føroyar og Danmark, ið víðførir økt sjálvstýri, so atkvøð fyri Javnaðarflokkinum til fólkatingsvalið.

# Hjálpið okkum at vinna!!

**Jógvan á Lakjuni**
*tingmaður og valevni Fólkafloksins*



Tá ið eg havi latið meg stillað upp til fólkatingsvalið, er tað tí, at eg haldi, at tað ongantíð sum nú hevur týdning, at Fólkaflokkurin framhaldandi eigur minst annað umboðið har niðri.

Fólkaflokkurin hevur í hesum valskeiðinum við Anfinni Kallsberg, løgmanni, á odda fingið sera góð úrslit í sambandi við viðurskifti okkara við danir - vit kunnu bara hugsa um loysnirnar í bankamálinum og ikki minst um semjuna um sjálvstýristilgongdina frameftir.

Óli Breckmann, sum í mong ár hevur umboðað Fólkaflokkin á fólkatingi, hevur verið ein týðandi brikkur í hesum loysnunum. Hann hevur verið ein virðilig føroysk rødd, sum altíð hevur vart føroysk sjónarmið við lív og sál. Vit vita eisini, hvussu hentur hann hevur verið fyri mangan føroyingin, tá ið brúk hevur verið fyri hjálp á ymsan hátt.

Tað er tí so sera týdningarmikið, at vit framvegis eiga hesa borgarligu, føroysku røddina á fólkatingi, og eg fari at heita á allar føroyingar - og serliga á veljararnar í mínum egna valdømi: Góðu eysturoyingar! Sitið ikki heima valdagin, 20 nov., men farið á val og stuðlið okkum í Fólkaflokkinum! Hjálpið okkum at vinna!

# Fullveldi fram fyri fólkapensión, sigur samgongan

**Atli Hansen**
*Valevni hjá Sambandsflokkinum*



Ríkisfelagsskapurin verjir vælferðina - og fólkapensiónina, sigur Sambandsflokkurin.

Undir hesi samgonguni er tað ferð eftir ferð staðfest, at um valið er millum fullveldi og at gera okkurt skilagott her heima á klettunum, so hevur samgongan valt fullveldi. Og tað sær út hareftir.

Nú gremur eitt valevni hjá Tjóðveldisflokkinum seg um at fólkapensiónin er lægri enn í Danmark og at hetta líkist ongum. Hesum kunnu vit øll geva honum rætt í, men hví hevur hann og hansara flokkur, Tjóðveldisflokkurin, einki gjørt við hetta? Teir hava nú sitið 3? ár við ræðið og hava havt fram úr góðar fíggjarligar møguleikar fyri at gera okkurt við trupulleikarnar, men nei, teir hava sett peningin á bók í staðin m.a. tí at teir ikki sjálvir trúgva upp á fullveldisprojektið. Eitt sum heild niðurpínt land, tí samgongan helst í heimildarloysi hevur uppkravt ein okursskatt til at leggja í grunn í staðin fyri at brúka hann til rakstur av samfelagnum. Skúlar, sjúkrahúsverkið, eldrarøkt, allar røktarskipanir skrígga eftir hjálp hvør á sínum øki. Alt til fánýtis, tí samgongan skal hava sítt fullveldi.

Sambandsflokkurin tvíheldur um ríkisfelagsskapin, tí í honum hava vit nógv størri møguleikar fyri at menna okkara samfelag - harundir at skaffa okkara eldru eina virðiliga fólkapensión. Vit eiga ikki at sleppa hesum fyrimunum uttan víðari.

Ein atkvøða fyri Sambandsflokkin er ein atkvøða fyri ríkisfelagsskapinum og fyri íløgur í framhaldandi vælferð.

Veljið Sambandsflokkin!